StÍF–H71 37–25 (14–13)

# StÍF heldur kósina

**Í einum dysti, sum var meira linligur enn spennandi, vann StÍF tryggan sigur á H71**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Strandingar skuldu sunnudagin royna at halda fast um silvurmerkini, sum teir hava tókst av hava gott tak á síðani vetrarsteðgin. Eisini hóast teir eftir steypafinaluna høvdu eina sokallaða down-periodu, har úrslitini als ikki vóru eftir vild.

Hetta viðførdi, at Kyndil brádliga var í so nær í stríðnum um heiðursmerkini, men sigurin á VÍF mikudagin tóktist tó at hava givið strandingum ein avgerandi fyrimun.

Fyrstu løtuna av dystinum sunundagin var tó ikki nógv, sum bendi á, at talan var um sama lið, sum júst hevði bast komandi meistarunum. John Petersen og Sveinbjørn Poulsen vóru ikki tøkir til dystin, men ein skuldi kortini roknað við, at H71 ikki á nakran hátt fór at hótta StÍF.

Hoyvíkingar vóru tó oman á stóran part av fyrra hálvleiki, men seinasta korterið ella so eydnaðist tó heimaliðnum at fáa nøkur mál á rað, soleiðis at teir vunnu seg framum.

Í seinna hálvleiki tóktust strandingar eina mest at hugsa um, at halda fast um leiðsluna, og uttan stórvegis hóvasták varð hetta eisini gjørt. Seinastu 10 minuttirnar ella so, øktu teir brádliga nógv um munin, soleiðis at máltalvan hóast alt sýndi ein rættiliga tryggan sigur, tá avtornaði, hóast tað sjáldan vóru nakrar ábendingar um, at so skuldi verða.

## Lág ferð

Ein av leikarunum hjá heimaliðnum sunnudagin var Leivur Justinussen, tó at hann ikki fekk tað nógvu tíðina á vøllinum.

Eftir dystin metti hann ikki, at talan var um ein dyst av teimum allar bestu.

– Tað var ikki nøkur serliga høg ferð á dystinum. Mann freistast næstan til at siga, at tað var ein slíkur dystur, sum roknast kann við, tá spælt verður móti einum botnliði.



*StÍF spílaði seg ongantíð út, men teir vunnu tó tryggan sigur móti hoyvíkingum*

– Móti endanum av dystinum eydnaðiast tó at fáa nakað av ferð á, soleiðis at sigurin hóast alt gjørdist rættiliga tryggur, men nakað stórspæl var ongan tíð talan um, helt Leivur um sjálvan dystin.

Sum so var tað heldur ikki av avgerandi týdningi, hvussu nógv mál talan varð um, men hinvegin verður talan um ein sera týdningarmiklan dyst komandi mikudag fyri strandingar. Tá skulu teir takast við Kyndil, og eydnast teimum at vinna tann dystin, fer alt at benda á, at strandingar skulu ogna sær silvurmerkini.

Spurdur um tann dystin sigur Leivur, at teir sjálvandi hava ætlanir um at vinna dystin.

– Tað ætla vit sum so hvørja ferð vit fara á vøllin, hóast tað kanska ikki altíð hevur sæð soleiðis út. Tað er tó aloftast ein spurningur um at seta seg nóg væl upp. Tað sást eisini, tá vit akkurát megnaðu at basa Tjaldri, fyri síðani at vinna á VÍF, so eg vóni, at allir eru púra klárir til dystin móti Kyndli, sigur Leivur Justinussen at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
StÍF: Alexandur Johansen 9, Artur Johansen 9(5), Marius Joensen 6, Jón Rasmussen 5, Costin Dumitrescu 3, Kristjan Petursson 2, Andre Danielsen 2, Bent Djurhuus 1
H71: Halgir Dahl Olesen 9(1), Agnar Højgaard 4, Johnny Durhuus 3, Eyðun Højgaard 3, Rolf Mouritsen 2, Rene Dahl Olesen 2, Annfinn N. Debess 2
Brotskøst: StÍF 5, H71 1
Útvísingar: StÍF 1, H71 1
Dómarar úr Stjørnuni: Geir Wardum og Carsten Andersen

Stjørnan–VB 23–22 (813)

# Stjørnan fer við silvurinum

**Stjørnan nærum vissaði sær silvurmerkini, tá tær leygardagin vunnu á kappingarneytunum úr Vági**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er einki at ivast í, at tað vóru tey bæði næstbestu kvinnuliðini í landinum, sum skuldu dystast, tá VB vitjaði í Klaksvík leygardadgin. Oddasessurin hevur í langa tíð verið lagdur inn í ognina hjá VÍF, men silvurdysturin hevur alla tíðina verið beinharður.

Stjørnan fekk ein fyrimun í hesum, tá tær tíðliga í grundspælinum vunnu útidystin móti VB, men nú høvdu tær úr Vági so møguleikan at taka hetta aftur.

## Mistu alt

Fyrsta hálva tíman var eisini líkt til, at tað var júst hetta, sum VB ætlaði sær at gera.

Tær vunnun sær eina lítla leiðslu, og tá tær aftur ryktu miðskeiðis í hálvleikinum, kundu tær fara til hálvleiks við eini fimm mála stórari leiðslu.

Stjørnan hevur tó áður megnað at vunnið á júst VB, hóast mótstøðuliðið hevur veirð fleiri mál á odda, og fyrstu løtuna av seinna hálvleiki var eisini líkt til, at tað skuldi eydnast teimum at taka gestirnar aftur.

Áðrenn nakran vardi, høvdu tær strítt seg upp á javnt, men luftin mundi fara úr teimum, tá VB so svaraði aftur við at skjóta fýra mál á rað.

Tað eydnaðist tó enn eina ferð hjá heimaliðnum at toga seg upp, og sum um tað ikki var nóg mikið, megnaðu tær eisini at leggja seg framum, tá einir fimm minuttir restaðu av dystinum.

Hesa ferð megnaði VB ikki at svara aftur, og úrslitið gjørdist tí ein tepur sigur til Stjørnuna, sum eftir øllum at døma tryggjaði sær silvurmerkini við júst hesum sigri.

## Hava mist nokk

Venjarin hjá Stjørnuni, Rógvi Nielsen, tóktist eisini at vera væl nøgdur um, at tað eydnaðist Stjørnuni at vinna týdningarmikla heimadystin. Ikki minst, tí tað sá somikið svart út miðskeiðis í dystinum.

– Sum so spældu vit ikki so illa fyrra hálvleiki. Serliga í verjuni riggaði spælið hjá okkum, men hinvegin gekst meira enn striltið at skora. VB vardi væl, og tær dugdu eisini sera væl at nýta høvdið í álopspælinum, soleiðis at vit ikki fingu fatur á so nógvum, hóast eina væl virkandi verju.

– Í seinna hálvleiki royndu vit at trýsta ferðina uppeftir, og hetta eydnaðist eisini. Vit fingu fatur á teimum rættiliga skjótt, og so var dysturin aftur púra opin, greiðir Rógvi frá.

Tá vit at enda spurdu hann, um hann helst, at liðið við hesum hevði tryggjað sær silvurmerkini, svaraði hann, at tað roknaði hann so avgjørt við.

– Vit skulu missa onkur býtt stig, um tað ikki skal eydnast, og skal eg vera púrasta erligur, so haldi eg, at vit hava tveitt nóg nógv burtur, sum er, sigur stjørnuvenjarin at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Simona Dziugyte 10(6), Annika Ljósstein 5, Joan M. Joensen 3, Andriana Milodanovic 3, Una Olsen 2
VB: Andrea Lütz 8, Regina Radó 4(1), Gurið Mortensen 3, Mary Krosslá 3, Kristina Holm 2, Margreth Augustinussen 1, Eyðbritt Krosslá 1
Brotskøst: Stjørnan 8, VB 3
Útvísingar: Stjørnan 1, VB 1
Dómarar úr StÍF: Poli Hansen og Alexandur Johansen



*Tær tykjast greiðar um, at tað nú er Stjørnan, sum liggur best fyri at tryggja sær silvurmerkini*



KÍF-Kyndil 29-29 (16-15)

# KÍF vinnur ikki á Kyndli

**Triðju ferð í ár høvdu kollfirðingar at kalla sigurin móti Kyndli í pottinum, og triðju ferð í ár eydnaðist kortini Kyndli at toga ein javnleik til høldar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ikki kann sigast annað enn, at kollfirðingar í ár hava verið til stóran ampa fyri silvurvónrinra hjá Kyndli. Fýra ferðir hava liðini hitst, og av hesum hevur tað í trimum førum eydnast kollfirðingum at vunnið sær annað stigið.

At teir í Kyndli hava iðra seg um hetta, er ikki so nógv at iðra seg um, men hinvegin munnu tað tó vera kollfirðingar, sum hava størri orsøk at iðra seg um hetta. Í teimum trimum førum, har javnleikur hevur verið úrslitið, hava kollfirðingar nevnliga havt leiðsluna fram til tað bert hava resta fáir minuttir ella sekund av dystinum, og júst hetta var eisini talan um sunnudagin.

## Javnt allan vegin

Ikki tí, tá var ongan tíð soleiðis, at nakar stóru rmunur skilti liðini. Í fyrra hálvleiki gekk alla tíðina javnt á, og var tað nakar av pørtunum, sum átti munin, so var tað Kyndil. Hetta einamest tí kollfirðingar høvdu við at byrja upp fyri skotunum frá Bjarna Wardum.

Fram móti endanum av hálvleikinum eydnaðist tó kollfiðingum at toga seg framum, men fyrsta korterið av seinasta hálva tímanum leikaði tó framvegis javnt á.

Tá fekk KÍF knappliga eina stak góða periodu, har teir við fýra málum á rað syrgdu fyri, at teir rættiliga fingu lagt sjógv millum seg og mótstøðuliðið. Ikki minst var hetta takka veirð Óla Christiani í málinum, men eisini teir báðir útlendingarnir gjørdu nógv um seg úti á vøllinum.

Somikið nógv fingu teir burtur úr, at Kyndil eftir hetta fór út at mansverja báðar, í eini roynd at venda dystinum. Tað eydnaðist teimum eisini á hendan hátt at toga seg inn á mótstøðuna. Jónleif Sólsker tóktist púra órørdur av trýstinum, sum nú lág á kyndilsmonnum, og við fríspælingum til Janus Einar, umframt onkrum máli frá egnari hond, hevði hann eftir stuttari løtu togað Kyndil upp aftur á liðina á heimaliðinum.



*Tá tað sá svartast út hjá Kyndli, var tað fyrst og fremst Jónleif Sólsker, sum syrgdi fyri, at tað hóast alt gjørdist talan um eitt stig til teir grønu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hetta viðførdi eisini, at trýstið á KÍF leikararnar gjørdist sera stórt. Teir fingu tillutað eitt brotskast, men hetta varð misnýtt av leikandi venjaranum, og tá Bjarni so skoraði upp á sína rond frá sjey metrum, hevði Kyndil knappliga lagt seg á odda.

Tað eydnaðist kollfirðingum at javna, men við 50 sekundum eftir, skuldu kyndilsmenn havt góðar stundir at gera eina seinastu álopsroynd. Kollfirðingar løgdu tó alt í verjupartin hesa løtuna, og hóast tað kostaði tvær útvísingar, so kom stigið til høldar, tá Óla Christian vardi fyri seinastu kyndilsroyndini.

## Silvurdysturin

Hvat stigamissurin hevur at siga fyri silvurvánirnar hjá Kyndli, er ilt at siga, men í øllum førum munnu tær vera viknaðar nakað. Hinvegin hava kollfirðingar eisini hjálpt Kyndli, við at vinna á útivølli móti StÍF.

Avgerðin um hetta fellur helst partvíst mikukvøldið, tá Kyndil tekur móti strandingum, og meðan hetta fer fram, kunnu kollfirðingar bert sita og iðra seg um, at teir ikki fóru undir stigasavnanina nakað fyrr. Høvdu teir tað, er einki at ivast í, at teir vóru ein partur av stríðnum, men sum støðan er nú, so eru teir í einum slag av ongamannalandi, har tað hvørki ger til ella frá, hvørt teir vinna ella tapa, men treiskir sum teir eru, so sæst hetta tíbetur ikki aftur í avrikum teirra.

### Dysturin í tølum:

**Málskjúttar:**
KÍF: Durica Tomic 8(4), Iljan Topic 8, Jákup Dam 5, Petur M. Johansen 5, Petur M. Poulsen 2, Kristjan Madsen 1
Kyndil: Bjarni Wardum 10(5), Jónleif Sólsker 6, Hans Áki Dal Christiansen 5, Regin Petersen 3, Janus Einar Sørensen 3, Hanus Jensen 1, Heini Bendtsen1
Brotskøst: KÍF 5, Kyndil 5
Útvísingar: KÍF 7, Kyndil 5
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Bárður Brimvík. Hóast talan var um ein rættliga rótutan dyst, so høvdu teir fyri tað mesta tamarhald á tí, sum fyrifórst á vøllinum.

VÍF-VB 26-18 (13-9)

# Eitt stig eftir á mál

**Bert eitt restar nú í, áðrenn VÍF hevur staðfest meistaraskapin. Dysturin sunnudagin sýndi greitt, hvussu einaráðandi tær eru í deildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ivaleyst hevði VB ætlað, at okkurt munagott skuldi koma burturúr, tá tær nýttu alt vikuskiftið norðanfyri.

Dysturin í Klaksvík leygardagin kastaði tó einki av sær, og hóast talan tá hevði verið um ein javnan dyst móti verandi meistarunum, so mundu vónirnar fyri stigum ikki vera av teimum allarbestu, tá farið varð á vøllin í Vestmanna. Eru tær úr Klaksvík verandi meistarar, so mugu tær úr Vestmanna vera komandi, og sunnudagin stðafestu tær enn einaferð, hví so er.

## Skiftu gear

At byrja við var annars talan um ein hampuliga javnan dyst sunnudagin. Liðini bæði fylgdust væl teir fyrstu 20 minuttirnar, og VB hevði eisini í løtum nevið framman fyri heimaliðið, sum ikki tóktist at vera komið í rættað gearið frá byrjan.

Hetta fekk tó eina vend, tá farið var um miðjuna av hálvleikinum. Ioana Rápa, sum fram til tá hevði verið rættilga einsamøll um málskjótingina, fekk nú brádliga hjálp frá liðfeløgunum. Sóleyð hótti úti frá, Fríða og Nicolina fóru at stríðast sum vant, og tá verjan eisini fekst at rigga, kundi Manuela soleiðis av og á seta nøkur skjótálop í gongd. Alt fyri eitt tóktist hetta at gerast møtumikið hjá VB, og seinastu tíggju minuttirnar undan steðginum, fekk VÍF soleiðis økt um munin.

Eftir at heimaliðið hevði fingið togað seg fram um, var sigurin hjá teimum í roynd og veru ongan tíð hóttur. Onkun tíð slapp VB at nærkast eitt lítið sindur, men oftast var hetta tá tær hjá VÍF royndu at spæla heldur fikst. Eitt nú tá Sóley einar tvær ferðir royndi seg við smørtum fríspælingum, sum ístaðin endaðu við VB álopum. Í roynd og veru kundi sigurin hjá VÍF verið størri, men Guðrun í Lágabø stóð seg gjøgnumgangandi væl í dystinum, og ikki minst tók hon sær av nógvum royndum frá Jacklin.



*Hevði tað ikki verið fyri eina væl spælandi Guðrun í VB málinum, kundi talan lættliga verið um ein størri sigur hjá VÍF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Eru best

Sum sagt, so gjørdist talan enn eina ferð um eina uppvísing frá VÍF, sum sostatt bert er eitt stig frá at tryggja sær meistaraheitið. Umframt stóra munin í stigum, er málmunurin hjá VÍF eisini somikið góður, at tað skal meira enn eitt vanliga gott hugflog til at ímynda sær, at VÍF ikki verður meistari.

Orsøkirnar til hetta eru eisini fleiri, men tær munnu nú vera viðgjørdar somikið ofta, eingin orsøk er til at taka saman um aftur hesar. Bert kann staðfestast, at VÍF í ár hevur verið klárt besta liðið í landskappingini. Tær hava eitt lið, sum er sterkari enn hini, hevur betri bóltførleika og ikki minst eru tær í góðari venjing. Har umframt hevur liðið eisin individualistar sum Sóley og Ioanu, og hesar megna nærum hvørja ferð at taka yvir, um kollektivið svíkur.

Fyri VB er ikki nógv annað at gera enn at staðfesta, at tað so heldur ikki varð í ár, at tær gjørdust meistarar. Einki er tó at ivast í, at liðið hjá VB skuldi gingið eini bjartari framtíð í møti. Leikaratilfarið er gott, fyri tað mesta ungt, og verður rætt borið at, eigur liðið eisini í komandi árum at seta sín dám á føroysku hondbóltstindarnar.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**

VÍF: Ioana Rapa 10(4), Fríða Marjunardóttir 4, Sóley Mikkelsen 4 (1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 3, Jacklin Durhuus 3(1), Alis Høghamar 1, Randi Kúrberg 1.
VB: Christina Holm 7(2), Ragina Radó 4, Andrea Lütz 3, Gurið Mortensen 2, Eyðis Kjærbo 1, Mary Krosslá 1.
Brotskøst: VÍF 7, VB 3
Útvísingar: VÍF 3, VB 4.
Dómarar úr H71: Petur Skeel Dahl & Bárður Brimvík. Stýrdu við myndugleika tí, sum fyrifórst úti á vøllinum, men tað vildi tó verið ynskiligt, at nógva togaríið varð revsað harðari.